# Nútíðarhumanisman hevur støði í upplýsingartankanum



Róí Patursson: - Skalt tú grundgeva moralskt nyttar ikki at sitera hvørki Aristoteles ella Bíbliuna, tú mást fara inn í spurningin sjálvan og argumentera, ja - moralskt! Vilt tú skilja náttúruna, mást tú granska náttúruna. Skalt tú skilja økonomisku politisku gongdina í samfelagnum mást tú seta teg inn í tað, sum hevur við pengar, vinnu, arbeiði og politik at gera

**Samrøða við háskúlastjóran, filosoffin og skaldið Róa Patursson um ein aktuellan spurning, sum er frammi í almenna kjakinum í Føroyum - humanismu**

SAMRØÐA
*Kim Simonsen*



*"Skalt tú skilja økonomisku politisku gongdina í samfelagnum mást tú seta teg inn í tað, sum hevur við pengar, vinnu, arbeiði og politikk at gera. Tann, ið hevur lisið Bíbliuna, Illiónskvæðið ella Bhagavadgita, hevur óivað onkrar andligar fyrimunir fram um tann, sum einki kennir til hesar klassikarar, men kann ikki brúka hesar tekstir sum síðsta orðið í eini diskussión um dagsins vandamál. Tað er hetta, sum humanisma leggur dent á: øll menniskju eru líka - ikki eins - og eingin kann tiltuska sær moralskan framíhjárætt."*

*Róí Patursson*

Kim: - Hvat er humanisma?

Róí: - Tað er allarhelst ómøguligt at geva eina definisjón, sum allir humanistar taka undir við. Partvíst tí talan er um eitt kensuborið "ja-orð", sum nógv onkusvegna vilja brúka um sína egnu lívsáskoðan. Og partvíst tí tað í roynd og veru finnast ymisk sløg av humanistiskum felagsskapum, rørslum ella "skúlum". Tað eru kristnir, marxistiskir, eksistentialistiskir, jødiskir, ateistiskir, vísindaligir, etiskir og næstan-hvat-sum-helst humanistar. Í eini orðing hjá International Humanist and Ethical Union eitur tað m.a.: "Humanisma er ein demokratisk, ikki-teistisk og etisk lívsáskoðan, sum leggur dent á ábyrgd og rætt menniskjans til at forma sítt egna lív og at geva tí meining."

Tann sekulera, ikki-religiøsa, humansiman, kann kanska best lýsast sum ein hugburður, ið er sprottin úr eini ásannan av, at mannaættin sjálv uttan yvirnatúrliga hjálp er noydd at vinna á vandamálum tilverunnar. Eingin uttan vit sjálvi - um nakar yvirhøvur - kann svara teimum spurningum vit seta, og tað eru ikki gudar, men vit sjálvi, sum mugu gera heimin til eitt gott stað at vera í.

## Humanisma og humanitetur

*Kim: - Er humanisma og humanitetur, tað at vera humanur, tað sama?*

Róí: - Tað átti tað helst, men er tað ikki altíð. Humanitet, menniskjaligheit, er nakað vit vísa í verki og ikki nakað vit kunnu nevna ella definera okkum til. Nógv av teimum, sum útinna munandi humaniter avrik, virka útfrá ikki-humanistiskum sannføringum og millum teirra, sum ikki luttaka í humaniterum virksemi finnast eisini humanistar. Nú veit eg ikki, um eg havi skilt spurningin rætt, men um tað humana kunnu vit eisini spyrja: hvussu langt røkkur ella eigur okkara humanitetur at røkka: djóraheimin, planturíkið? Kunnu vit meiningsfult siga ella krevja, at humanitetur eigur at liva upp til tað vald, sum okkara vitan og teknologi hava givið okkum?

*Kim: - Er ein hugsan aftan fyri humanismuna sum tilgongd, tvs. er ein hugmyndafrøði ella ein heimspeki aftanfyri hetta navn?*

Róí: - Nútíðarhumanisman hevur støði í Upplýsingarfilosofiini, sum í sínum lagi bygdi á klassiska filosofi. Men samtíðis hevur humanisman røtur bæði í hebraiskum, indiskum og kinesiskum tradisjónum. Fyri Upplýsingarhumanismuna var tað tó serliga umskiftið frá mytologiserandi til grundgevandi og kritiska hugsan, sum fór fram í tí fornu griksku mentanini, ið hevði týdning. Tað vóru hugsarar sum Locke, Hume, teir fronsku upplýsingarfilosoffarnir og Kant, sum innførdu, kanska uppfunnu, ta humanistisku optimismuna: Tað vitbornskilið er evsti myndugleiki í øllum andligum ella intellektuellum spurningum og merkir hetta, at menniskjað er sjálvstøðugt moralskt sæð. Við skilagóðari útbúgving og vísindaligiari vitan fer mannaættin sum frálíður at frígera seg frá allari yvirtrúgv og byggja ein skilagóðan heim. Tað góða og meiningsfulla lívið er ein ítøkiligur møguleiki, og heldur enn til fánýtis at royna at fáa skil á Guds ætlan eiga vit sambært upplýsingarhugsjónini at granska náttúruna, samfelagið og menniskjað fyri at skapa eina betri verð.

Demokrati, talifrælsi og tolsemi skulu tryggja, at allar menniskjaligar resursir, øll politisk og átrúnaðarlig sjónarmið, skuldu sleppa framat í tí stóru samrøðuni, hvørs einastu autoritetar eru skilið og tann góði viljin - tí grundleggjandi er menniskjað gott. Í dag kann tann upprunaliga humanisman tykjast í so góðvarin. Tann postmodernistiska kritikkin haldi eg vera sjálvmótsigandi, tá tað snýr seg um spurningar um sannleika og veruleika, men tann filosofiska avdúkingin av naivitetinum í tí humanistisku trúnni á tað óhefta subjektið, objektiva skilið og sjálvsagda framburðin má takast í álvara, um humanisman framvegis skal vera eitt sannførandi alternativ til totaliterar ideologiir og trúarlærur.

## Øll trúgva - tíbetur

*Kim: - Sum heimspekingur - kanst tú siga - um vit í Vesturheiminum eru um at gerast ein sekulerur heimspartur, gudleys menniskju ella er hetta ein vanlig misskiling?*

Róí: - Sekulariseringin er ein stútt og støðug tilgongd. Men eg haldi ikki, at hetta er tað sama sum, at øll sum frálíður gerast "gudleys menniskju". Tað hava altíð verið relativt fá, sum vóru treytaleyst trúgvandi, eins og tað altíð hava verið fá, sum vóru ateistar. Hava tey flestu ikki okkurt slag av tillagaðari trúgv, kanska vantrúgv? - mann trýr eitt sindur henda veg og eitt sindur handa veg, sum tað nú einaferð hóskar seg - tíbetur, annars hevði einki grannalag verið tolandi.

Annars er sekularisering sum so ikki nakar sjálvstøðugur máttur, men eitt úrslit av ómetaliga nógvum hendingum, hugsanum og gerðum í gerandislívi, politikki og mentan. Kanska er tað møguligt at samanfata hetta í tí sannroynd, at vit í minni og minni mun góðtaka grundgevingar, ið vísa til tradisjón og autoritet. Skalt tú grundgeva moralskt nyttar ikki at sitera hvørki Aristoteles ella Bíbliuna, tú mást fara inn í spurningin sjálvan og argumentera, ja - moralskt! Vilt tú skilja náttúruna, mást tú granska náttúruna. Skalt tú skilja økonomisku politisku gongdina í samfelagnum mást tú seta teg inn í tað, sum hevur við pengar, vinnu, arbeiði og politik at gera. Tann, ið hevur lisið Bíbliuna, Illiónskvæðið ella Bhagavadgita hevur óivað onkrar andligar fyrimunir fram um tann, sum einki kennir til hesar klassikarar, men kann ikki brúka hesar tekstir sum síðsta orðið í eini diskussión um dagsins vandamál. Tað er hetta, sum humanisma leggur dent á: øll menniskju eru líka - ikki eins - og eingin kann tiltuska sær moralskan framíhjárætt.

*Kim: - Kann humanisman gerast ein trúgv - ein nýggjur guddómur, sum t.d. Luc Ferry meinar um mannarættindini?*

Róí: - Tað er altíð ein vandi - menniskjað er tað, sum vit øll vita, segði Demokritos - og vit vita frá okkum sjálvum, hvussu skjót vit eru at gera okkara egnu sannføringar til nakað absolutt.

*Kim: - Hava dannilsi, humaniora og humanisma nakað við hvørt annað at gera?*

Róí: - Eftir túsund ára gloymsku, meðan kristindómurin var einaráðandi í Europa, verður tann forngrikska humanisman enduruppdagað júst sum "Studia humanitatis". "Humanisma" verður upprunaliga brúkt sum eitt frámerki í mun til ta vísindaligu og matematisku granskanina: "humanistar" vóru lærarar og studentar, sum fingust við retorik, grikskt og latínskt mál, søgu, estetik og etik. Upprunaliga var dannilsi kanska mest ein spurningur um at hava elegansu og stíl í skrift og talu - í grundini ein hugsjón um ta góðu útbúgvingina. Ikki fyrr enn í 19. øld, sum eg havi skilt tað, vann tankin fram, at menniskjað skuldi "dannast" í týdninginum "mennast og kultiverast" so tann sanna menniskjaliga veran, sum í grundini var skilagóð, kundi realiserast.

## Fremmandagerð

*Kim: - Sartre, Adorno og Frankfurtaraskúlamenninir tosaðu nógv um fremmandagerð. Sosiologar sum Weber, eins og yrkjarin Brecht royndu at vísa okkum tað í verki innan leiklistina, ið var henda "verfremdungseffekt". Í eksistentialistiskari heimspeki hava bæði Heidegger og Sartre hildið á at spyrja. Nakað tað sama sum Kierkegaard setur spurningar um menniskjans frælsi og val. Hvussu fatar humanisman hesa fremmandagerð, og hvussu eru viðurskiftini millum humanismu og eksistentialismu?*

Róí: - Hugtakið og hugsanin um fremmandagerð og fremmandastøðu menniskjans gongur aftur til kristna filosofi. Tey, sum ikki trúu á og kendu Gud, vóru fremmand á jørðini. Seinni verður hetta viðvent – eitt nú í verkunum hjá Feuerbach: Trúgvin á at Gud er alt og menniskjað lítið og einki, ber í sær, at tann trúgvandi verður "fremmandur" mótvegis sær sjálvum. Menniskjað hevur so at siga flutt sína andligu natúru, kenslur, eginleikar, evni og møguleikar yvir á eina veru handan tíð og rúm, sum afturfyri einráðin avger alla meining við tilveruni hjá sama menniskja. Tað er í ávísan mun henda hugsanin um "fremmandagerð", sum humanisman hevur yvirtikið haldi eg; men hetta er ikki nakar einfaldur spurningur at svara. Og so er tað hesin vansin við hugtakinum um fremmandagerð, at tað kann heftast á so at siga allar nýggjar og ókendar tilgongdir.

Viðurskiftini millum eksistentialismu og humanismu eru áhugaverd, men so fløkt at eg dugi ikki at geva eitt stutt og greitt svar. Men eg ímyndi mær, at ein lýsing av hesum spurningi má byrja við at staðfesta, at humanisturin sær ta menniskjaligu natúruna sum eitt grundstøði, meðan eksistentialisturin sær ta menniskjaligu natúruna sum eitt úrslit av livaðum lívi. Samanbera vit ta pragmatisku humanismuna við eksistentialismuna hjá Sartre, so er munurin eyðsæddur - tann fyrra setur tað objektiva skilið hægst og leggur alstóran dent á, at vit fáa vísindaliga vitan um okkara samfelagsliga og natúrliga umhvørvið - tann seinna setir tað frælsa og sjálvskapandi individið hægst og hevur lyndi til at skúgva teoretiska vitan til viks. Frá einum humanistiskum sjónarhorni er eksistentialisman irrationell og tilvildarlig við sínum tosi um, at einstaklingurin frítt skapar seg sjálvan sum menniskja og hevur ábyrgd av síni egnu lagnu. Frá einum eksistenialistiskum sjónarhorni er humanisman ein falskur tryggleiki, ella ein ideologi, við sínum tosi um at tað skilagóða menniskja við upplýsing og vísindum kann vinna á øllum myrkursins kreftum.

Hesar hugsanir umskarast sjálvandi á nógvum økjum, men um tað finst ein veruligur felagsnevnari av etiskum ella humanistiskum virðum, tað eru tað ymiskar meiningar um.

Heidegger, sum tú eisini nevnir, vendir bakið til modernitet og humanismu. Ístaðin roynir hann at orða eina hugsan, sum fer afturum ta vesturlendsku filosofiina, tí henda - sambært Heidegger - neyðturviliga endar í oyðileggjandi teknologi og nihilismu. Eg haldi hugsanina hjá Heidegger vera líka so avbjóðandi sum ivasama - her er ein samanrenning av mystikki, morali, vísindateori og politikki, sum kann fáa tankan á flog, men alt ov ofta er tað meir tulkan og giting enn greining og grundgeving. Um tað kann sigast, at religión og humanisma bjóða hvørjum av í stríðnum um, hvørji virði eiga at mynda okkara tilveru, so er tað ikki heilt burtur við at siga, at antihumanisman hjá Heidegger er triðja avbjóðingin, sum bæði humanisma og trúgv, hvør í sínum lagi, mugu mæla ímóti.

Hetta eru sera áhugaverdir og krevjandi spurningar tú hevur sett, ikki minst hetta um viðurskiftini millum humanismu og eksistentialismu, men Heidegger hætti eg mær ikki at fara í holt við her og nú, tí so verði eg ikki liðugur hesumegin jól. Men kanska kunnu vit venda aftur til hetta eina aðru ferð?



*Róí Patursson, heimspekingur og skald: - Humanisma leggur dent á, at øll menniskju eru líka - ikki eins - og eingin kann tiltuska sær moralskan framíhjárætt.*